


*Ólavur Thorsteinsson, samskipari, avmyndaður í Tórsgøtu, har Ólavsøkukonsertin verður hildin 27. Jui*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Ólavsøkukonsertin ein heildaruppliving

**Tórshavnar Býráð er fyriskipari av ólavsøkukonsertini í ár og samskipari er settur at taka sær av tiltakinum, ið verður á útipallinum í Tórsgøtu, umfamt í Perluni og á Reinsarínum**

Dagfinn Olsen

Ólavur Thorsteinsson er samskipari av tiltakinum 27. Juli, ið ber heitið Ólavsøkukonsertin. Tað er Tórshavnar Býráð, ið hevur sett samskiparan.

Men í veruleikanum er hetta meira, enn ein konsert, tí bæði Perlan og gamla Reinsaríið eru partar av tiltakinum.

Undirbeat verður í Perluni, og í Reinsarínum fara uppkomandi bólkar at spæla, tað vil siga bólkar, ið enn eru ungir og á veg fram í ljósið.

Ólavur Thorsteinsson sigur, at roynt verður at skapa Ólavsøkukonsertina sum eina heildaruppliving. Har er útipallurin, og so Perlan og Reinsaríið. Alt økið í Tórsgøtu kring konsertina er karmur um konsertina, ið við hesum tiboðum hevur eina breidd, og okkurt til ung og eldri.

## Duné

Høvuðsnavnið á Ólavsøkukonsertini 2010, er danski bólkurin Duné, sum millum annað hevur vunnið stórar virðislønir sum t.d. P3 prisen, Gaffa prisen og Danish Music Awards. Duné eru í løtuni á ferð í Europa.

Føroysku bólkarnir, sum fara á pallin, eru vælkend nøvn; Páll Finnur Páll, Guðrið Hansdóttir, Bet You Are William, Crawling Blue og Jens Marni Hansen.

Í skrivandi stund er bert greitt, at millum uppkomandi bólkarnar, ið spæla á Reinsarínum, er Grandma´s Basement.

## Gamalt tiltak

Ólavsøkukonsertin kann sigast at vera gamalt tiltak. Tað var miðskeiðis í áttatiárunum, at FUT, Føroya Undirhaldstónleikarafelag, fór undir at hava ólavsøkukonsertir.

Tann, ella tær, fyrstu vóru á Skansanum í Havn, og riggaði hetta avbera væl. Men myndugleikar og friðingarnevnd mettu, at økið ikki toldi slíkt virksemi. Sostatt fór ólavsøkukonsertin at reika, og hetta gjørdist ein drúgv ferð. Hon var á vøllinum við Læraraskúlan, á bryggjuøkinum niðanfyri Skansan, á Skálatrø og í Kommunuskúlagarðinum. Men við tiltakinum Asfalt sást, at Tórsgøta riggar væl sum konsertøki, og nú er gøtan karmur um Ólavsøkukonsertina.

## Útlendskt við

Fyrstu konsertirnar høvdu sum reyðan tráð, at føroyskir bólkar spældu. Og fyrstu mongu árini var tað nokk eisini so, at allir bólkar, ið teknaðu seg- og har limirnir høvdu limaskap í FUT, sluppu á pallin. Mangir nýggir, ungir, bólkar royndu seg óivað fyri fyrstu ferð av álvara á hesum pallinum.

Men seinni mundi alsamt harðari kapping frá stevnum, festivalum og øðrum gjørt, at Ólavsøkukonsertin datt niðurfyri. Men hon kláraði at sigla vandasjógv. Skifti kanska ham og lurtarafjøld nakrar ferðir, men enn í dag, eini 25 ár eftir byrjanina, er hon til.

Men fyri nøkrum árum síðani fekk Ólavsøkukonsertin útlenskt navn ovast á konsertlepan, fyri at standa seg í kappingini, og soleiðis hevur verið seinnu árini. Og so er aftur í ár, har væl dámdi danski bólkurin Duné er høvuðsnavn.